# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað, sum hendi í Suðurossetia, vísir, hvussu vandamikið tílíkt er, og hesum eiga onnur at læra av*

*Dmitrij Medvedev*




## Kennedy helt kensluborna røðu

Edward Kennedy, senatorur, helt eina sera kensluborna røðu, tá demokratiski flokkurin í USA fór undir tann endaliga uppstillingarfundin í gjárkvøldið. Kennedy hevur livað illa í seinastuni og varð lagdur undir skurð í vár. Men hann tykist vera komin fyri seg aftur, og í røðuni lovaði hann at vera hjástaddur á Capitol Hill, tá næsti forsetin verður tikin í eið í januar.

- Eg lovi tykkum, at eg verði á Capitol Hill, tá Obama verður tikin í eið sum forseti, segði Edward Kennedy, sum hevur verið senatorur í 46 ár.

Kona Barrack Obama, Michelle, helt eisini røðu í nátt, og onnur, sum skulu hava orðið, eru millum annað Hillary Clinton, Joe Biden og sjálvandi Barrack Obama.

# Russland kann kvetta við NATO og hóttir Moldova

**- Vit hava fyrireikað okkum til at taka ta avgerð, sum verður neyðug, segði russiski forsetin, Dmitrij Medvedev, eftir ein fund við russiska NATO-sendimannin, Dmitrij Rogozin, í gjár**

Russiski forsetin segði, at spenningurin millum Russland og NATO-londini kann enda við, at Moskva kennir seg noytt til at kvetta alt samband við NATO. Hann segði, at tað verður ikki lætt at taka eina tílíka avgerð, men hann legði afturat, at sambandið við NATO er viknað munandi orsakað av ósemjuni um tað, sum hendi í Suðurossetia.

Í gjár hitti Dmiotrij Medvedev forsetan í Moldova, Vladimir Voronin, og sambært russiskum keldum nýtti Medvedev høvi til at ávara Moldova ímóti at brúka hermegi ímóti einum landsluti, sum vil sleppa úr ríkinum, eins og Georgia gjørdi í Suðurossetia. Russiski forsetin sipaði við hesum til moldoviska landslutin Transdnjestr, sum vil sleppa at leggja saman við Russlandi.

-Tað er rætt av okkum at tosa um støðuna í Transdnjestr longu nú, og eg haldi, at vit hava góðar møguleikar at loysa knútin, segði Dmitrij Medvedev aftan á fundin við moldoviska forsetan.



## Krevja lívlangt fongsul fyri tvey barnamorð

**Svenska ákæruvaldið krevur, at ein týsk kvinna skal fáa lívlangt fongsul, tí hon beindi fyri tveimum børnum**

Tann 32 ára gamla kvinnan er ákærd fyri at hava lopið á eina 23 ára gamla kvinnu og børn hennara í svenska býnum Arboga tann 17. mars í ár. Mamman og børnini vórðu flutt á sjúkrahús, men læknarnir fingu ikki hjálpt teimum báðum børnunum, sum doyðu a sjúkrahúsinum. Mamman slapp harafturímóti livandi frá álopinum.

Týska kvinnan hevur viðgingið, at hon var í Arboga tann 17. mars, men hon noktar seg seka í ákæruni. Ákæruvaldið er harafturímóti ikki í iva um, at hon er sek. Kvinnan búði fyrr saman við sambúgvanum hjá teirri 23 ára gomlu kvinnuni, skrivar svenska tíðindastovan TT.

**STUTT SAGT**

## Cheney til Georgia

Amerikanski varaforsetin, Dick Cheney, boðaði í gjár frá, at hann fer til Georgia fyrst í næsta mánað. Cheney skal eisini vitja Ukraina, Aserbajdsjan og Italia, men tað er serliga vitjanin í Georgia, sum Hvítu Húsini leggja dent á, tí Georgia hevur júst verið í vápnaðum stríði við Russland.

Sambært amerikonsku fjølmiðlunum fer varaforsetin úr Washington tann 2. septembur.



*Dick Cheney er amerikanskur varaforseti*

*Mynd: Polfoto*

## Enn ein fløga frá Berlusconi

Italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, er sum kunnugt ein fjølbroyttur maður, og nú skriva italsku fjølmiðlarnir, at tann umstríddi stjórnarleiðarin er í ferð við at leggja seinastu hond á eina tónleikafløgu, sum ætlandi skal koma út til jóla.

Blaðið La Republica veit at siga, at Berlusconi ger løgini, og at sangarin Mariano Apicella leggur rødd til. Sangarin sigur við blaðið, at teir báðir arbeiða av lívsins kreftum fyri at fáa fløguna út upp undir jól.

Hetta er aðru ferð, at ein fløga við tónleiki hjá Silvio Berlusconi kemur út. Tann fyrra kom í 2003, og tað var eisini Mariano Apicella, sum sang ta ferðina. Sum ungur var italski forsætisráðharrin sangari umborð á einum ferðamannaskipi.



*Silvio Berlusconi fyllir 72 um nakrar dagar*

*Mynd: Polfoto*